# Garvilt trøllashow

**Talan verður helst um villasta trøllashowið higartil, tá Trøllapætur og omman fara á pallin á Summarfestivalinum**



*Tað plagar ikki at ganga friðarliga fyri seg, tá trøllini eru á palli. Og tað gjørdi tað heldur ikki í Kommunuskúlagarðinum á ólavsøku*

TRØLLASHOW
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Trøllapætur og omman hava úr at gera, nú tey rigga til rimmar framførsluna, sum verður í Klaksvík leygardagin. Um ólavsøkuna tóku tey bæði sær kortini stundir til eitt legg suður til Havnar, tá Ossi helt 700 ára føðingardag í einum fullsettum tjaldi í Kommunuskúlagarðinum.

Her fingu vit eisini orðið á Trøllapætur, og vit spurdu hann, hvørt hann og omman høvdu fyrireikað nakað til Summarfestivalin. Ein festivalur, har tey aftur í ár eru millum nøvnini, sum skulu á stóra pallin við Vágsbø.

– Eg veit ikki ordiliga, hvat omma ætlar sær, men hon hevur snakkað ófført við Magna Arge hesa seinastu tíðina. Eg haldi, at hon hevur gjørt onkra avtalu við tyrluskipararnar hjá Atlantic Airways, sum eisini hava hjálpt okkum áður.

– Akkurát hvat hon ætlar, veit eg ikki. Men eitt veit eg, og tað er, hon hevur hugt nógv eftir James Bond seinastu tíðina. Serliga hasi scenuni, tá hann hongur úr eini tyrlu. Og so garvill, sum omma er, so kann hon gott finna upp á okkurt líknandi.



*Ossi fylti ikki minni enn 700 ár seinasta fríggjadag. Men tað er óvist, um hann hevur tíð at fara til Klaksvík, ella um hann noyðist aftur til Spania at ansa øllum virkseminum hjá sær*

**Rock'n roll**

Men annars ætla tey bæði trøllini bara at seta ordiligt lív í festivalin, sigur Trøllapætur.

– Omma elskar rock'n roll, og eg ivist ikki í, at hon hevur biðið Steintór og teir um at finna bæði keyboard og guitara fram. So har verður futtur í fyri allar pengarnar. Og sjálvt um Erling og Jógvan onkra tíð eru eitt sindur súrir við ommu, so rokni eg við, at vit eisini fáa teir báðar at syngja og dansa. Erling hevur eisini vant ordiliga nógv í seinastuni, og nú dugir hann ordiliga væl at spæla klaver. Tað segði Jógvan eisini, tá vit høvdu konsert her í dag.

Meira enn tað sama hevði Trøllapætur ikki stundir til hesa løtuna í Kommunuskúlagarðinum. Fleiri hundrað børn – og eisini nógv vaksin – vildu tosa við trøllini, og so nyttar lítið at brúka alla tíðina til fjølmiðlafólk.

Men eitt man vera púrasta víst. Tað er lagt upp til ein knappan tíma, har sangir, spæl, skemt og fjas til børn millum 1 og 100 verður á skránni. Keðiligt hevur tað ongan tíð verið, tá trøllini bæði og teirra vinir fara á pallin.

## Klaksvíkar Timburhandil stuðlar Summar Festivalinum



*Klaksvíkar Timburhandil og Summar Festivalurin hava gjørt samstarvsavtalu, sum tryggjar útbyggingina av festivaløkinum*

**Klaksvíkar Timburhandil er við til at tryggja útbyggingarnar á festivaløkinum í Klaksvík.**

SUMMARFESTIVALUR
*Tíðindaskriv*

Summarfestivalurin hevur nú keypt eitt nýtt tjald. Tjaldið er heilar 78 metrar langt og skal nýtast til strekkið frá rundkoyringini við posthúshornið til bygningin hjá Føroya Tele. Tað vil siga, at økið, har allir básarnir plaga at standa, verður nú innilokað. Økið skal nýtast til matstøð, barrir og aðrar sølubúðir.

Í hesum sambandi hevur Klaksvíkar Timburhandil játtað at stuðla Summarfestivalinum. Timburhandilin í Klaksvík fekk nýggjar eigarar í mei-mánaði í ár, og vilja teir hervið gera seg enn meiri sjónligar í nær umhvørvinum.

– Summarfestivalurin er eitt serligt tiltak, sum fevnir um allar aldursbólkar. Tískil mettu vit, at tað var eitt sera gott hugskot at stuðla tiltakinum, sigur Jónstein Knudsen, stjóri á P/f Snaraløkur, sum eru nýggju eigararnir av Klaksvíkar Timburhandli.

Hann heldur fram, at Summarfestivalurin kemur øllum við – kanska serliga í Klaksvík – men eisini kring Føroya land.

# Trøllaomman byggir hús

**Húsini úti í Geil skulu bæði um- og útbyggjast. Í løtuni arbeiðir omman við at fígging, men tað roknar hon við kemur í rættlag**

TRØLL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Saman við Trøllapæturi hevur Trøllaomman í longri tíð hugsað um at gera nakað við tey so væl kendu húsini. Trøll verða jú gomul, og trøllahús halda sum so ikki longur enn hús hjá okkum vanligu menniskjum, og tí hava ábøtur verið harðliga tiltrongdar í eina tíð.

Men slíkt kostar, og tað er avmarkað, hvussu nógv omman hevur kunnað forvunnið sær av peningi við vanligum arbeiði. Bæði tí hon sum heild hevur havt trupult við at halda fast í nøkrum starvi, og tí tað eisini kann er trupult at fáa tíðina at strekkja til, um hon skal hava fult starv, samstundis sum hon skal jagstra leikamafiuna, ferðast til Spaniu at vitja Ossa, gera ræstan fisk og garnatálg til Trøllapætur og mangt annað.

Men nú sær kortini út til at muna nakað hjá ommuni. Saman við Trøllapæturi hevur hon forvunnið nakað við at geva út filmar, fløgur og onkra bókina eisini, og tí er nakað av peningi komið á bók.

Enn er endaliga fíggingin ikki komin í rættlag, men sum skilst, so er komið væl áleiðis í hesum. Byggiloyvi og annað kann ofta verða ein trupulleiki, tá talan er um gomul hús. Men málið hevur longu verið fyri á býráðsfundi í Klaksvík, og har tykjast allir partar vera positivt innstillaðir mótvegis ætlanini.

*Í eina tíð hevur verið arbeitt við at fáa Trøllapæturi og ommuni nýggj hús. Og sum skilst restar nú ikki nógv í, áðrenn ætlanin gerst veruleiki*

